## Skeið í
# Line-Dansi
### í Eydnuni á Oyrarbakka

Tað hevur eydnast okkum at fáa ein av kendu dansi-instruktørunum í The Outlaws, Gitte Kristoffersen, at undirvísa í line-dansi.
Skeiðið verður 22. og 23. apríl í Eydnuni. Byrjað verður fríggjadagin kl. 16.00 og hildið verður fram leygarmorgun kl. 10.00.

**Hold 1** - Nýbyrjarar:
Fríggjadagin
Kl. 16.00 - 18.45
Leygardagin
Kl. 10.00 - 12.45



**Hold 2** - Vand:
Fríggjadagin
Kl. 19.15 - 22.00
Leygardagin
Kl. 13.15 - 16.00

**Øll eru vælkomin**
Skeiðið er fyri øll dansiáhugaði, nýbyrjarar sum vand, ung og gomul. Line dansur er ikki par-dansur, so støk eru eins vælkomin sum pør.

Kostnaður er kr. 300,- fyri hvønn.

**Tilmelding**
Tilmelding fer fram á tlf. 722.322 skjótast gjørligt og seinast 21. apríl. Avmarkað pláss.

**Almennur dansur**
Leygarkvøldið verður góður almennur country-dansur, har Driv spælir. Til hetta kvøldið hevur Driv gjørt seg út til eisini at spæla line-dansiløg.

**Ungmannafelagið Eydnan**
400 Oyrarbakki
Tlf. 422.322 el. 722.322

Sosialurin 341800

## Royndarbáturin "HARALDUR" til sølu



Um hóskandi boð fæst, er royndarbáturin "Haraldur" til sølu. Báturin er 12 m langur og 3.68 m breiður. "Haraldur" hevur A fiskiloyvið og er annars sera væl útgjørdur við øllum hentleikum og komfortin er fyrsta floks.

Umborð eru 5 elektriskar OILWIND snellur. Báturin er frá juni 2001. "Haraldur" hevur tveir diesel motorar á 320 hestar hvør. Motorarnir hava bert koyrt 900 tímar. Báturin hevur kraftiga bógskrúvu og kann venda runt um eina "eittkrónu". "Haraldur"gongur 26 míl.

Umframt fiskarí, er báturin sera væl egnaður til fiskitúrar- og útferðir við turistum, leigutúrar o.a.

Sosialurin 341800

**Meira fæst at vita um bátin við at ringja ella skriva til Jákup S. Joensen fartlf 212 422 - jakup@oilwind.fo**

## Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

# Aðalfundur

felagsins verður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag mikukvøldið 27. apríl kl. 20.00.

Skrá sambært lóg felagsins.

**Nevndin**

# Koyri-kort?

Teoriskeið til persónbil byrjar **mánadagin 18.04 kl. 17**

SISERO 351800

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2301,** P/F Føroya Kassasøla, 625 Glyvrar.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn (nevndarlimur) Bjarni Ólavson Dalsgarð, Traðargøta 51, 160 Argir (nevndarformaður)
**Innkomin í nevndina:** Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn (nevndarformaður) Olaf Olsen, 625 Glyvrar (nevndarlimur)

Skráseting Føroya
tann 13. apríl 2005

Kristin Balle

# Logistikkleiðari

### Starvslýsing
Søkt verður eftir logistikkleiðara til Rakstrar- og Framleiðsludeildina hjá Postverki Føroya. Deildin hevur høvuðsábyrgdina av allari postviðgerð og postútbering.

Talan er um nýtt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har neyðugt verður at bróta upp úr nýggjum. Tú skal taka tær av at samskipa allan logistikkin í øllum postkervinum. Logistikkleiðarin kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við deildarleiðaran á økinum og verður varamaður hansara.

### Uppgávur:
- Gera og viðlíkahalda logistikkskipanir fyri alt postkervið
- Seta upp leiðbeiningar fyri komandi og farandi post
- Gera upplegg til politikkir á framleiðsluøkinum
- Optimera postviðgerðina
- Útgreina mannagongdir fyri útbering og handfaring av posti
- Luttaka í verkætlanum í sambandi við optimering av mannagongdum

### Persónligir eginleikar
- Góð evni at samskifta
- Góð samstarvsevni
- Dámar væl avbjóðingar og er ágrýtin
- Heildarorienterað/ur
- Úrslitsøkjandi

### Fakligir førleikar
- Millumlanga útbúgving innan fyri t.d verkfrøði, búskaparfrøði ella tilsvarandi útbúgving
- Viðkomandi arbeiðsroyndir

### Løn og setanartreytir
- Sambært nærri avtalu

### Umsóknin
Freistin at senda inn umsókn er 1. mai 2005

Henda skal stílast til:

Postverk Føroya, att. postverksstjórin
Óðinshædd 2, 100 Tórshavn
Telefon 346020, Fartelefon 212146

Postverk Føroya

**Almanna- og Heilsurøktarafelagið**
J. Paturssonargøta 24 · Postboks 350
110 Tórshavn – Føroyar (Faroe Islands)
Tlf. 315670 · Fax 315727
E-mail: ahf@post.olivant.fo

# Aðalfundur

felagsins verður týsdagin 19. apríl 2005 kl. 10.00 í hølum Starvsmannafelagsins, J. H. Schrøtersgøtu 9. Morgunmatur er kl. 9.30.

**Skrá:**
1. Frásøgn nevndarinnar frá farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
3. Val av 2 nevndarlimum og 1 tiltakslimi
4. Val av tveimum grannskoðarum
5. Innkomin mál
6. Ymiskt

Pál Weihe heldur fyrilestur um fólkaheilsu kl. 13.30.

**Nevndin**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

LFB

# Landsfelagið fyri bjargingarfeløgini

Ársaðalfundurin verður í Grønlendingahúsinum, Jøkulstræti, Tórshavn, leygardagin 30. apríl kl. 10.00.

**Fundarskrá:**
1) Val av orðstýrara og fundarskrivara
2) Frágreiðing formansins
3) Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar
4) Feløgini boða frá teirra vali av nevndarlimi og tiltakslimi í nevnd LFB's
5) Val av einum grannskoðara, sum skal vera skrásettur ella løggildur
6) Val av umboðum og varaumboðum í nevndir og ráð
7) Møgulig innløgd mál
8) Ymiskt

**Landsfelagið fyri bjargingarfeløgini**